**Leiðreglur fyri fylgjarakort til fólk, ið bera brek.**

## 1. Endamál

Fylgjarakortið hevur til endamáls at tryggja, at fólk, ið bera brek, og tískil hava tørv á fylgjara, tá ið tey ferðast ella luttaka í ymiskum tiltøkum, hava rætt til at taka fylgjaran við sær, uttan at goldið verður ferðaseðil ella atgongumerkið fyri fylgjaran.

## 2. Hvør hevur rætt til fylgjarakort

Fylgjarakort verður útflýggja fólki, ið bera brek, og sum orsakað av breki teirra, hava tørv á at hava fylgjara við sær, tá ið tey ferðast ella fara til ymisk tiltøk.

Tørvurin á fylgjara kann verða grundaður á bæði likamligt og sálarligt brek og er ikki treytaður av aldursmarki.

## 3. Umsiting

Meginfelag teirra brekaðu í Føroyum (MBF) hevur um hendi alla umsiting av fylgjarakortinum.

## 4. Umsókn

Umsókn um fylgjarakort skal fyllast út á serligum skjali, ið fæst við at venda sær til MBF á annaðhvørt www.mbf.fo ella á skrivstovuni á Íslandsvegi 10 C í Tórshavn. Umsóknaskjalið verður at senda til MBF, sum viðgerð umsóknina og tekur avgerð um, hvørt fylgjarakort verður útflýggja umsøkjara.

## 5. Skjalprógv

Tá ið søkt verður um fylgjarakort, skal tørvurin á fylgjara kunna skjalprógvast við minst einum av niðanfyristandandi skjølum ella játtanum:

### *5.1 Læknaváttan*

Útgangsstøðið er, at tørvurin skal verða skjalprógvaður við læknaváttan frá egnum lækna.

Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
The Faroe Islands
týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
Tel: +298 317373
mbf@mbf.fo
www.mbf.fo

*5.2 Góðkenning til ymsar almennar veitingar*

Læknaváttan krevst tó ikki, um umsøkjari kann skjalprógva, at viðkomandi er góðkendur at fáa eina av niðanfyristandandi veitingum ella hevur góðkendan limaskap.

- Bútilboð á stovni ella sambýli

- Parkeringsskelti fyri fólk, ið bera brek
- Játtan um stuðul til at keypa bil, sbrt. kunngerð um stuðul til at keypa bil o.a. sbrt. forsorgarlógini
- Viðkomandi er limur í Blindafelag Føroya. (Talan skal vera um fullan limaskap, ið er treytaður av, at eygnalækni váttar, at sjónin er undir 10%. Talan er sjálvsagt ikki um stuðulslim)

*5.3 Serlæknaváttan*

Ein serlæknaváttan, ið prógvar tørvin á fylgjara, kann verða nýtt sum skjalprógv í staðin fyri læknaváttan frá egnum lækna. Metir MBF, at serlæknaváttanin ikki er nøktandi, hevur MBF heimild til harumframt at krevja læknaváttan frá egnum lækna.

**6. Gjald**

Fylgjarakortið kostar kr. 200,-

**7. Gildistíð og endurnýggjan av fylgjarakortinum**

Fylgjarakortið hevur gildi í 3 ár. Eftir hetta skal tað endurnýggjast við at senda inn nýggja umsókn saman við haldgóðum skjalprógvi fyri tørvin á fylgjara.

**8. Treytin fyri nýtslu av kortinum**

Kortið er galdandi á øllum støðum, har MBF hevur gjørt avtalu við myndugleikar, feløg og onnur.

Kortið skal nýtast sum skjalprógv fyri, at kortánarin hevur tørv á fylgjara við sær, tá ið viðkomandi ferðast ella luttekur í tiltøkum.

Kortánarin skal gjalda fyri seg, men við at vísa fram kortið, tá ið goldið verður, hevur viðkomandi rætt at hava í mesta lagi ein fylgjara við sær og onki gjald verður tá tikið fyri fylgjaran.

**9. Afturkalling**

Kortánarin hevur skyldu til at boða MBF frá, um broytingar vera í viðurskiftum, sum hava týdning fyri fortreytirnar fyri at kortið varð útflýggja.